## DAGSINS MEINING

# Ein stórhending

Tað var einki minni enn ein stórhending, tónlistarligt og eitt tøkniligt bragd, ið allar Føroyar vóru vitni til leygarkvøldið, tá AME fór fram í Norðurlandahúsinum. Allir partar eiga mikið rós uppiborið og Útvarp Føroya, Sjónvarp Føroya og Norðurlandahúsið framdu eitt toppprofessionelt avrik. Vit hava øll góðar grundir til at vera stolt av hesum okkara sera týdningarmiklu mentanarstovnum. Alt gekk sum eftir ánni og tiltakið var avviklað á ein hátt, sum má vekja stóra virðing hjá áskoðarunum í húsinum eins væl og kring alt landið. Hvør einstakur røkti sína uppgávu og útinti ti sín sín leiklut á sera professionellan og effektivan hátt. Hesin partur av tiltakinum var á altjóða støði og vit nýta høvið her at ynskja fyrireikarum og luttkarum tillukku við einum framúrskarandi avriki. Karmarnir vóru perfektir og alt riggaði sera væl.

Tað er eitt sera gott hugskot at gera Prix Føroyar til annað og meira enn eina kapping millum rútmiskar bólkar. Við at víðka hetta hugtak til eitt Atlantic Music Event gjørdu fyrireikararnir tað møguligt veruliga at vísa, hvat okkara rútmisku tónlistafólk megna og duga. Fyri rútmiska tónleikin í Føroyum var tiltakið eitt stórt frambrot. Heildarmyndin eftir framførslurnar er tann, at rútmiski tónleikurin nú av álvara er komin á altjóða støði. Tónleikarar, ungir sum meira tilkomnir, hava tikið seg ómetaliga nógv fram. Støðið hækkar í hvørjum og eingin ivi er um, at fleiri av luttakarunum hava eina framtíð á altjóða rútmiska tónlistapallinum, um tey veruliga ynskja tað.

Ein týðandi partur av tiltakinum AME er sjálvandi, at hetta tiltak skal medvirka til at framflyta ella promovera føroyska rútmiska tónlist uttanlanda. Skulu føroysk tónlistafólk áhaldandi mennast listarliga og skulu tey kunna liva av tónlistini, er neyðugt at koma út um landoddarnar. Hetta er ein sera týðandi partur av hugmyndini við AME. Vit vilja sjálvsagt vóna, at tiltakið í so máta virkar eftir endamálinum. Tað er lítið at ivast í, at allir føroyingar fegnast yvir tiltakið AME og yvir høga støðið hjá tónlistafólkunum. Vit fegnast eisini um, at nøkur av teimum mest framúrskarandi rútmisku tónlistafólkunum vóru heiðrað á AME kvøldinum tað verið seg við at hava verið innstillað til heiður ella við at vinna heiður. Hetta er gott og soleiðis eigur tað at vera.Tó eigur at viðmerkjast, at eisini millum teirra, sum ikki vunnu heiðursløn hetta kvøldið eru framúrskarandi tónleikar og tónasmiðir. Vit eiga at virðismeta okkara listafólk, meðan vit kunna. Tað er eisini positivt, at ferðabrúgvin nú er við at gerast veruleiki. Við hesum er fyrsta stigið í rútmiska tónlistaálitinum sett í verk. Vónandi verður tað til gagns fyri alt tað rútmiska tónlistaumhvørvið í Føroyum.

Tað er heldur eingin loyna, at eins og okkara landslið í fótbólti er við til at skapa Føroyum viðurkenning og ábyrgd úti í heimi, so vóna vit, at eisini tónlistarliga landslið okkara við øllum sum frægu tónlistafólkum kann gerast Føroyum eitt gott umboð úti í heimi. Tað er eisini greitt, at ikki bert kæra móðurmál okkara kemur til sín rætt á altjóða pallinum, men eisini Føroyar sum tjóð og fólk koma til sín rætt úti millum heimsins lond. Tað er nakað vit eiga at vera errin av. Tað birtir uppundir sunna og góða tjóðskaparkenslu.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Um trúgv

**Viðmerking til greinina hjá Thorbjørn Brochs í Sosialinum 22. mars í ár: Hvør trýr "nokk"?**

**Dánial á Dul Jacobsen**

Spurningurin hevur støði í umrøðuni av einum afrikanskum trúboðara, sum hevur verið umtalaður í donsku, kristnu vikuavísini Udfordringen. Nú veit eg ikki heilt vist, hvønn afrikanara Thorbjørn sipar til, men av tí at vit halda Udfordringen og hava gjørt tað í fleiri ár, giti eg, at tað er Charles Ndifon meint verður við. Er tað hann, so má viðmerkjast, at eisini føroyingar eru, sum eru blivnir vælsignaðir av tænastuni hjá hesum manni. Tað er ikki so langt síðani, at ein kvinna í Klaksvík vitnaði í sendingini "Tilvera" um, hvussu undurfult hon varð vorðin grødd frá lívs-hóttandi krabbameinssjúku, eftir at nevndi afrikanari hevði biðið fyri henni.

Nú kann tað vera, at eg giti skeivt, men blaðið Udfordringen er eitt so mikið seriøst blað, at tað við vissu kann sigast, at tey ikki nýta blaðrúmd til persónar, sum tæna og virka á óbíbilskum grundarlagi. Men líkamikið hvør persónurin er, so haldi eg meg í greinini hóma nakrar álvarsamar misskiljingar. Satt at siga, so skilji eg ógvuliga væl próvførslurnar hjá tær Thorbjørn, tí í nógv ár gekk eg sjálvur við somu fatanum. Í dag taki eg als ikki undir við teimum og dugi heldur ikki at síggja tað bíbilsku funderingina fyri slíkari próvførslu. Dugi heldur ikki at síggja at hetta slagið av próvførslu kann hjálpa nøkrum ella verða til signing fyri nakran.

Tað at Paulus hevði likamligan veikleika, merkir ikki á nakran hátt, at hann ikki hevði trúgv fyri guddómligari grøðing. Hann bæði lat seg brúka sum Guds amboð til grøðing fyri onnur, og sjálvur tók hann eisini í móti grøðing til sítt egna likam. At hann lat seg brúka til grøðing fyri onnur síggja vit bæði í Efesus har: ***"Gud gjørdi við hondum Paulusar størri kraftargerðir enn vanligt, so at enntá sveittadúkar og fyriklæði, sum verið høvdu á likami hansara, vórðu borin til hini sjúku; sjúkurnar viku tá frá teimum, og hinir illu andarnir fóru út."*** Og í oynni Malta har Paulus saman við øðrum var strandaður: ***"So bar á, at faðir Publius lá sjúkur av blóðgangi og við fepri. Paulus fór tá inn til hansara, bað og legði hendurnar á hann og grøddi hann. Táið hetta hevði hent, komu eisini hini har í oynni, sum sjúkur høvdu, og vórðu grødd."*** Hetta kunnu vit lesa í Ápostlasøguni kapittul 19 og versini 11-12 og í kapittul 28 versini 8-9. Harafturat var Paulus, sambært 2. Korintbrævi kapittul 1, ógvuliga tilvitaður um hjálpina, sum forbønin frá øðrum veitir.

So er tað spurningurin um trúgv. Mótstøðufólk av forbøn spyrja ofta, fyri ikki at siga altíð: Hvat so við teimum, sum biðið verður fyri og sum ikki verða grødd? Og so verður hesin spurningurin nýttur sum ábreiðsla í móti teimum, sum prædika trúgv til grøðing. Hvør skal siga: Halt uppat við hasum, tí nøkur verða vónbrotin. Hetta er ein ógvuliga løgin ábreiðsla. Hevði tað verið, at ábreiðslan var, at tú prædikar ikki nóg klárt, so kundi eg góðtikið hana. Loysnin uppá væntandi úrslit bæði til frelsu og til grøðing má vera at fáa enn meiri ljós yvir Guds orð, tí "so kemur tá trúgvin av tí, sum prædikað verður". Sjálvur kenni eg fólk, sum hóast tey leingjast og leita og lurta, so kunnu tey kortini ikki siga, at tey eiga frelsuvissuna. Skulu vit so halda uppat at prædika evangeliið, tí nøkur verða vónbrotin? Og munnu tey vónbrotnu gerast glaðari um prædikan tagnar? Nei, tvørturímóti, so mugu vit gera okkum enn meiri ómak at prædika orð Guds klárt og týðuliga!

Ongastaðni síggi eg at Jesus ella skriftirnar rósa vantrúnni. Hinvegin so rósar Jesus tveimum heidnum fólkum fyri teirra stóru trúgv: Einum rómverskum herhøvdinga í Matteus kapittul 8 og eini kánaneiskari kvinnu í Matteus 15. Jødarnir hinvegin, og eisini lærisveinarnir, blivu hartaðir fyri sína vantrúgv: "Tá svaraði Hann teimum: ***"Tú vantrúna ætt! Hvussu leingi skal Eg vera hjá tykkum? Hvussu leingi skal Eg tola tykkum?"*** Markus 9:19.

Ein erligur máti at koma til Jesus við sínum trupulleikum er at koma sum hin pápin, sum rópti til Jesus: ***"Eg trúgvi — hjálp vantrúgv míni!"*** Markus 9:24.

# Lóggeva okkum 100 ár aftur í tíðina, nú vit skriva 2005

**Finnleif Guttesen**

Hvat er hatta fyri ein dupultmoralur og innantóm heilagralótir, sum løgtingsfólk vísa Føroya fólkið við afturlatingarlógini

Nú ætlar løgtingi, at lóggeva nær fólk skulu fara á møti ella í kirkju. SVF vísti fleiri løgtingsfólk, ið við himmalvendum eygum og gloriu um høvdi, tóku undir við afturlatingarlógini, tí tað skuldi verða so gott fyri okkum øll.

Størri møsn enn tað vit hoyrdu í SVF frá løgtingslimum skulu vit leita leingi eftir og enn tá var tað ein ungur prestur, sum segði, at so kundu børnini binda frið í tíðarskeiðinum millum kl. 10 og 14.

Eitt skilagott uppskot var, og tað kom adventistapresturin við, har hann segði, at løgtingið skuldi slett ikki blanda seg uppí upplatingartíðirnar.



Lati handilseigarar, starvsfólk og fakfeløg teirra avgera, nær og um tey vilja hava opið, og latum okkum fáa frið fyri tykkara dupultmorali og innantómu heilagralótum.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.